

*Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í uttanríkismálum og formaður í Fólkaflokkinum, Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum og Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum og formaður í Javnaðarflokkinum ætla sær at verða verandi á brúnni í Tinganesi, hóast veljarakanning gevur samgongu skot fyri bógvin. Her eru teir stæddir á brúnni á flaggskipi føroyinga Norrønu*

*Mynd Jan Müller*

# ABC verandi á brúnni

**Hóast tveir av samgonguflokkunum ganga aftur í seinastuni veljarakanningini, sum FYND hevur gjørt fyri Kringvarpið, so siga trý av landsstýrisumboðunum og teirra millum tveir floksformenn seg vilja halda fram á brúnni á ABC skútuni. Teir halda ikki, at veljarakanningin er nakað skot fyri bógvin á samgonguskútuni**

*Á brúnni umborð á Norrønu*
*Jan Müller*

Nýggjasta veljarakanningin, sum Fynd hevur gjørt fyri Kringvarpið gevur teimum trimum samgonguflokkunum eina afturgongd uppá eitt mandat, úr 20 niður í 19 tingfólk. Javnaðarflokkurin missir eitt tingfólk og somuleiðis Fólkaflokkurin. Sambandsflokkurin gongur tó fram við einum tingfólki aftrat. Stóri vinnarin í kanningini er umframt Sambandsflokkin, Tjóðveldi, sum fær eitt tingfólk aftrat og er landsins størsti flokkur.

Portalurin hevur hitt umboð fyri teir tríggjar samgonguflokkarnar á brúnni á flaggskipi føroyinga, Norrønu, sum júst í hesi løtu er miðskeiðis í Norðsjónum á veg móti Føroyum úr Esbjerg, har almenn vígsla var leygardagin.

## Løgmanseffekt

Johan Dahl, vinnumálaráðharri (B) fegnast um góða úrslitið hjá Sambandsflokkinum, sum hevur eina framgongd uppá góð 3% í mun til valúrslitið. –Eg leggi tó ikki nógv í veljarakanningar, men tað er altíð hugaligt, tá flokkurin gongur fram. Sjálvandi gevur tað eitt sindur eyka, at tú hevur løgmann, tað hava vit sæð hjá øðrum flokkum. Hvat framtíðini viðvíkur, so haldi eg, at ABC er tann besta samgongan vit kunnu fáa í løtuni, og eg fari at gera mítt til, at hon fer at halda tørn og verða verandi á brúnni. Hóast kanningin vísir, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldi hava 17 tingfólk og harvið nokk til at skipa samgongu einsamallir, so heldur Johan Dahl ikki, at hetta eigur at fáa verandi samgonguflokkar at gevast við samstarvinum.

# Niclassen: Neyðugt við sterkari samgongu

**At flokkarnir í samwwgonguni nú hava fingið eina minni afturgongd samanlagt, førkar ikki tann veruleika, at flokkarnir hava eina velduga undirtøku samlað. Hon eigur tí at kunna halda fram sigur Jørgen Niclassen, formaður í Fólkaflokkinum, nú veljarakanning Fynd hevur gjørt fyri Kringvarpið vísir, at ABC flokkarnir missa eitt mandat**

*Á brúnni á Norrønu*
*Jan Müller*

Jørgen Niclassen, uttanríkisráðharri (A) og formaður í Fólkaflokkinum sigur, at Fólkaflokkurin stendur seg vanliga ikki val í veljarakanningum. Flokkurin fer aftur við 1,5% úr 20,1 niður í 18,6% og missir eitt mandat. Hetta er so ein av teimum frægu veljarakanningunum fyri Fólkaflokkin, síggja vit burtur frá, at flokkurin missir eitt mandat, tí afturgongdin hevur áður verið størri. –Man skal ikki taka hesa veljarakanningina av tungt. Samgongan hevur bert sitið eitt hálvt ár, og eg haldi, at allir tríggir flokkarnir hava roynt at fingið samstarvið á koyra meira enn at profilera flokkarnar. Tá vilja tað altíð henda forskjótingar. Tað er neyðugt at hava eina sterka samgongu fyri at klára tær tíðir, sum standa fyri framman. Har meta vit, at hesir tríggir flokkarnir eru besta borgan fyri tí. At hesir flokkarnir nú hava fingið eina minni afturgongd, førkar ikki tann veruleika, at flokkarnir hava eina velduga undirtøku samlað. Hon eigur tí at kunna halda fram.

Jørgen Niclassen sigur, at henda samgonga má halda fram, tí vit standa fyri torførum tíðum. -Eg havi gott mót um, at hesir tríggir flokkarnir megna at halda fram. Vit eru ein samgonga, og tað vit gera, tað mugu vit gera í felag, tí eiga vit eisini at verða løntir bæði í góðum og ringum, saman.